Álit

í

løgtingsmáli nr. 32/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í sambandi við at ávísar sektir fara í landskassan (Fylgibroytingar til broyting í revsilógini § 50, stk. 1)

Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum, hevur lagt málið fram tann 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 7. november 2025 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. og 25. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Við hesum lógaruppskotinum verður skotið upp at gera eina røð av broytingum í ymsum løgtingslógum, sum eru ein neyðug fylgja av løgtingsmáli nr. 31/2025 um at broyta revsilógina.

Løgtingsmál nr. 31/2025 snýr seg um at broyta § 50, stk. 1 í revsilógini við tí endamáli at áseta, at sektir fara í landskassan, tó so at sektir fyri brot á lóggávu á ikki yvirtiknum málsøkjum og ferðslulóggávuna fara í ríkiskassan.

Løgtingsmálini vórðu við 1. viðgerð viðgjørd undir einum, og víst verður til viðmerkingar í álitinum í løgtingsmáli nr. 31/2025.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 28. november 2025

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen	Ingilín Didriksen Strøm
Kristianna W. Poulsen	Henrik Old	Steffan Klein Poulsen
	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	